# Einskiljingar: Vit hava f

**Løgmaður vísir aftur, at tað er nøkur orsøk til at stúra fyri einskiljingum, sum ætlanin er at fremja, men tað hevur stóran týdning, at javnaðarflokkurin setir eitt greitt mark fyri, hvat kann einskiljast**

*– Tað er heilt neyðugt, at javnaðarflokkurin setir sær eitt greitt mark fyri, hvat kann góðtakast av einskiljingum, segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður, á landsfundi javnaðarfloksins um vikuskiftið*



EINSKILJINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Endamálið við einskiljingum er at fáa greiðan skilnað ímillum tað almenna og tað privata. Endamálið er at taka váðan frá landskassanum og leggja hann yvir á tey privatu, so at landskassin kann brúka sína orku til uppgávur, sum ongin annar ger og sum ongin annar skal gera.

Jóannes Eidesgaard vísir aftur óttanum frá Tummas Arabo og øðrum javnaðarfólkum fyri teimum einskiljingum, sum ætlanin nú er at seta í verk.

Á landsfundinum hjá javnaðarflokkinum nevndi hann, at endamálið við einskiljingunum er at frígera kapital til at betala skuldina niður fyri og til at útbyggja okkara vælferð fyri.

Jóannes Eidesgaard fegn-

# Einskiljingar eru ein hóttan í

**Gamli stjórin á Strandferðsluni, Tummas Arabo, ávarar staðiliga ímóti at einskilja Atlantsflog, Føroya Tele og aðrar almenna fyritøkur, sum ætlanin er at selja í næstu framtíð, tí tað fer at avskepla føroyska samfelagið**

EINSKILJINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialinum.fo*

– Verða tær almennu fyritøkurnar einskildar, soleiðis sum samgongan ætlar, fer tað at avskepla alt tað føroyska samfelagið.

Tað heldur Tummas Arabo.

Tummas Arabo er verkfrøðingur og hann var í nógv ár stjóri á Strand-ferðsluni. Hann hevur eisini verið bæði løgtingsmaður og landsstýrismaður og annars hevur hann fylgt gjølliga við gongdini í føroyskum politikki í meiri enn eitt mannaminni.

Og á landsfundinum hjá javnaðarflokkinum á Svangaskarði á Toftum hetta vikuskiftið, heitti hann staðiliga á flokkin um at forða fyri teimum einskiljingum, sum ætlanin nú er at fremja í næstu framtíð.

Annars er avgjørt í samgonguni, at bæði Atlantsflog, Føroya Fiskavirking og Farmaleiðir hjá Strandferðsluni, skulu einskiljast í næstu framtíð. Men annars er heilt greitt, at tað gongur ikki long tíð, so verða bæði Føroya Banki, Føroya Tele og aðrar fyritøkur eisini einskildar.

Og tað eru eisini politiskar kreftir, sum enntá vilja einskilja bæði SEV og nýggja Smyril.

Men á landsfundinum hjá javnaðarflokkinum kom fram, at tað er langt ífrá semja í flokkinum um hesar einskiljingar.

## Eitt stórt bakkast fyri útjaðaran

Tann, sum ávaraði harðast ímóti ætlanini, var Tummas Arabo, sum sjálvur hevur royndir av at einskilja almennar fyritøkur.

Og tær royndir vóru so mikið beiskar, at verður ætlanin hjá samgonguni sett í verk, stúrir hann fyri gongdini í samfelagnum.

– Verða tær almennu fyritøkurnar einskildar, merkir tað, at samfelagið Føroyar frameftir skal rekast út frá marknaðarligum treytum, har tað ikki verður politiska valdið, men fríu marknaðarkreftirnar, sum gera av, hvussu samfelagið skal mennast og útbyggjast.

Tummas Arabo er púra sannførdur um, at hetta verður eitt stórt bakkast fyri allan útjaðaran í Føroyum.

–Hvør privat fyritøka vil eiga útjaðaran í Føroyum, spyr hann.

Hann svarar sjálvur: Ongin, tí har eru ongir pengar at forvinna og tað merkir, at útjaðarin fer ikki at verða mentur og útbygdur.

Tummas Arabo sigur, at tað eru á summum økjum, har tað er avgerðandi neyðugt at varðveita politiska ræðisrættin fyri at kunna tryggja, at politikarar ikki missa tamarhaldið á, hvussu samfelagið verður ment og útbygt

– Verða almennu fyritøkurnar einskildar, fer tað sostatt at avskepla tað føroyska samfelagið, tí so verða Føroyar bara Suðurstreymoy og einki annað, avarar hann.

## Ein hóttan ímóti samfelagnum

Upp undir landsfundin hjá javnaðarflokkinum, hevur spurningurin um einskiljingar verið til viðgerðar í Norðstreymoyar Javnaðarfelag og sostatt er tað greitt, at Tummas Arabo hevur alt javnaðarfelagið í Norðstreymoy aftanfyri seg.

Og hann heldur, at útlitini eru døpur, tí verða gongdin tann, sum hann stúrir fyri og útjaðarin verður við sviðusoð, er tað ein framtíð, sum als ikki hóvar honum.

– Føroyar eru ikki Føroyar uttan so at útjaðarin og smáu bygdirnar framhaldandi hava livilíkindi og menningarmøguleikar.

– Men alt hetta tosið um einskiljingar, er ein ein beinleiðis hóttan ímóti hesum málsetningi. Javnaðarflokkurin má sostatt forða fyri at SEV, Føroya Tele og flutningskervið verður einskilt og lagt upp í hendurnar á marknaðarkreftunum at røkja, sigur hann.

Hann sigur at á hesum økjum má politiski ræðisrætturin so avgjørt varveitast, annars avskeplast samfelagið.

Tummas Arabo er sostatt púra sannførdur um, at tað er alneyðugt fyri føroyska samfelagið, at politiski ræðisrætturin verður varðveittur á øllum undirstøðukervinum og tað tað er á telesamskiftinum, á orkuveitingini, og á samferðsluni, ikki minst á samferðsluni við umheimin.

Hann ávarar tí ímóti, at leggja hesi lívsneyðugu áhugamálini fyri samfelagið upp í hendurnar á marknaðarkreftunum at ráða yvir, tí so missa politkararnir tamarhaldið á støðuni og fáa ikki útbygt samfelagið, soleiðis sum politiski myndugleikin vil. Tvørturímóti fara Føroyar at verða útbygdar eftir marknaðarligum fortreytum og tað er ikki vist, at tær sampakka við politiska viljan.

## Ein háðan ímóti teimum gomlu

Tummas Arabo nevnir Atlantsflog sum dømi.

– Tað er fullkomiliga misskilt, tá ið sagt verður, at føroyingar stovnaðu Atlantsflog fyri at fáa kapping á økinum og fyri at fáa ferðaseðlaprísin niður.

– Tað vóru nógv fólk, við Atla Dam á odda, sum stríddist í eini 15 ár at gera eitt føroyskt flogfelag.

Og Tummas Arabo heldur enntá, at tað er ein grov niðurgerðing av Atla Dam og øllum hinum, at pástanda, at tey høvdu so stuttan sjónarring, at tey settu eitt heilt flogfelag á stovn fyri at fáa ferðaseðlaprísin nakrar hundrað krónur niður.

– Orsøkin til, at Atlantsflog varð sett á stovn, var tí at føroyskir myndugleikar sóðu, hvussu alneyðugt tað var, at føroyingar fingu ræðisrættin á flogferðsluni.

– Øll tilkomin fólk minnast, hvussu tað var at sita í tímar og dagar og bíðaðu eftir einum flogfari, tí tað ikki kom fram, tí at felógini, sum tá flugu upp á Føroyar, brúktu flogførini til okkurt annað.

– Øll tilkomin fólk minnast eisini, hvussu stórur vansi tað var, at ferðaætlanin hjá flogførinum ikki varð løgd so at hon gagnaði føroyingum best, men útfrá tí at hon skuldi passað inn í fluttningsmynstrið hjá dønum og íslendingum.

– Tí sóu politikarar, at tað var alneyðugt, at vit høvdu eitt flogsamband, sum var grundað á okkara tørv og har flúgvingin gekk útfrá Føroyum og ikki utfrá Danmark og Íslandi.

– At tað so eisini førdi til at ferðaseðlaprísirnar lækkaðu, var ein síðuvinningur, men tað var als ikki endamálið við Atlantsflogi, sigu Tummas Arabo.

Hann vísir eisini á, at tað almenna hevur sett nógvar pengar í Atlantsflog og tað er nú eitt felag, sum virkar fyrimyndarliga væl og sum er blivið grundarlagið undir einari veruligari vinnu-grein.

– Missa vit føroyskan ræðisrætt her, kunnu vit verða sett nógv ár aftur í tíðina, samstundis sum vit kunnu missa eina vinnugrein og yvir hundrað góðum arbeiðsplássum. Hann vísti eisini á, at leiðslan í Atlantsflogi er ikki áhugað í felagið verður einskilt og hann spurdi hvør tað so er, sum krevur tað.

Á landsfundinum hjá javnaðarflokkinum helt hann